# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur 10. s. e. trin.**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Petur Martin Rasmussen
***Nólsoy:*** kl. 12 Sonja Klein
***Sørvágur:*** kl. 11 altarg., David Johannesen
***Gjógv:*** kl. 11 messa Emil Olsen.
***Funningur:*** kl. 12.30 messa Emil Olsen
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Magnus Brahé Jørgensen. Talvan gongur í Klaksvík til frama fyri sunnudagsskúlan hjá heimamissiónini
***Hvannasund:*** kl. 12, altarg., Elsa Funding
***Vágur:*** kl. 11,
***Eldrabýlið í Vági:*** kl. 14, Patrick de Neergaard

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Mikudag kl. 15 Bøn.
Leygardag kl. 17 útifundur í Nólsoy í samband við Ovastevnuna.
Sunnudag kl. 18 Møti í Missjónshúsinum í Miðvági. Major Njál Djurhuus talar. (Einki møti í Tórsgøtu 19 sunnudag). Øll eru vælkomin.
sápa, suppa, frelsa síðan 1865.
www.frelsunarherurin.fo

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Møtini byrja aftur sunnumorgunin kl. 10.30 við familjumøti.
kl. 11.30 Samfelagsløta
kl. 12 tilbiðjunarmøti.
www.livdin.fo

**Ebenezer**
Mikudag kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Leygardag kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudag kl. 11.00 Minnismáltíð Harrans.
kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Kollafjarðar Missiónshús**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00 við luttøku úr Vík og Tjørnuvík.
Innsamling til húsið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins orð, Saltangará**
Skrá fyri vikuna:
Mikukvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Mikukvøldð kl. 20 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 10,30 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 AWAKE við Odu o.fl. Sunnudagin morgunmøti kl. 11 við ungdómi frá summartoymi.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti. PREP-skeið fyri hjún og Ungdóms ALPHA byrja í september, les meir á www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagur 8. august kl. 20.00 Bíbiltími.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Anna og David Rodda greiða frá trúboðaravirki teirra í Senegal. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, á Brekku 19**
Mikukvøldið kl. 20.00 er bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl.20.30 er ungdómsmøti. Ymiskir vitnisburðar, Simona Bringsberg endar.
Leygardagin kl.10.00 er morgunbøn.
Sunnudagin kl.14.00 er møti við Poul Nicolai Steinberg.
Hvønn gerandismorgun kl. 6:15 er morgunbøn.

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøld kl. 20.00 hugnaløta fyri ung.
Sunnukvøldið kl 18.00.
Møti mánakvøldið kl. 20.00 bønarmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20 bíbliutími 2. Pæt. 2. kap.
Sunnudagin kl. 18 møti v/ Bergljott og Eisinbjørg. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Tórsdag kl. 20 Bøn.
Sunnudag kl. 11 Halgunarmøti.
Sunnudag kl. 18 Evangeliskt møti har Eingrím Holm talar. Øll er vælkomin!!
www.frelsunarherurin.fo

**Stuðulsnevndin fyri svimjihyli í Nólsoy…**
…skipar á hvørjum ári ovastevnu. Í ár byrjar stevnan 10. august við serligari ungdómskonsert í tjaldinum á Klivum. Fjølbroytta og spennandi skráin verður í bløðunum og á heimasíðuni hjá Tórshavnar Kommunu. Serstøk ferðaætlan verður galdandi fyri samfersluna um fjørðin.
Ver vælkomin á ovastevnu!

**Gongutúrur úr Høvdarhaga til Søltuvíkar**
Sunnudagin 12. aug. kl. 14 verður skipað fyri gongutúri úr Høvdarhaga (Norðanfyri Skopun) og til Søltuvíkar. Jóan Petur Kjærbo, bóndi, verður ferðaleiðari. Túrurin verður roknaður sum ein miðal lættur túrur. Farið verður frá Bygdahúsinum Samljóð í Skopun kl. 14 og roknað verður við at túrurin tekur um -3 tímar. Í Søltuvík verður fólkið avheintað við bussi. Kostnaður kr. 50,- fyri limir og kr. 80,- fyri ikki limir. Tilmelding á Sandoyar Kunningarstovu, tlf. 361836, í seinasta lagi fríggjadagin 10. aug. kl. 15.

**Stóra Dímun**
Nú fara vit aftur at skipa fyri túri til Stóra Dímun. Túrurin byrjar í Sands havn sunnudagin 12. august kl. 10.30, har siglt verður við Hvíthamri út til oynna. Umborð er tað Jóan Petur Clementsen, ið er skipari. Komin til Dímunar, verður gingið upp gjøgnum Kleivina, saman við Dímunarbóndanum, sum eisini verður ferðaleiðari á oynni, hann vísir fólki runt har og greiðir frá. Til túrin er tað gott at hava heit klæðir við og matpakka. Túrurin verður einans sigldur, um veðrið er til vildar. Melda til á Sandoyar Kunningarstovu, tlf. 361836, í seinasta lagi fríggjadagin 10. august kl.15. Pláss er fyri 12 fólkum. Prísur: 400,-

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Uttanlandsferð við Norrønu til Noregs verður 20..- 24. september. Tilmelding við depositum á kr. 500,- á konto nr. 9865-103.338.1. í Norðoyar sparikassa í seinasta lagi 10. august.
Prísurin fyri hvønn er kr. 1500,- í 4-koyggjukamari. Eykakostnaður fyri 2-koyggjukamar kr.436,- fyri hvønn.
Gist verður 2 nætur á dupultkømurum á Thon Hotel Bergen Brygge.
Eru spurningar so ring Kristian Martin tlf. 775100 ella Óla tlf. 254272.

**Landsfelag Pensjónista**
Landsfelag Pensjónista
Tróndargøta 13
100 Tórshavn
tlf. 319394/219394

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava summarferiu, byrja aftur í august.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17.
Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.

**Tilhaldið á Toftum, tlf 448690**
***Tilhaldið fer nú í summarsteðg og byrjar aftur 4. sept.***

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag
kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag
kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Vágs Pensionistafelag og Dagtilhaldið**
gera útferð 17.-19. august. Gist verður á Runavíkar Sjómansheimi. Tey, ið vilja koma við, skulu tekna seg á tlf. 373446, 373285 ella 373261 áðrenn 1. august.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
Tlf. 321520 · t-postur: heilaf@post.olivant.fo

**Veit okkum eina hjálpandi hond**
at seta ein grønmetis ídnað á stovn, millum tey fátæku í Rumenien.
**Ring 905699.** Kostnaðurin er kr. 100 + vanligt uppringingargjald. Kundar hjá Kall kunnu ringja. Takk fyri tína hjálpandi hond.
*Calarasi missiónin v/ Thomas J. Askham, Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.*

**Sandoyar Kunningarstova**
*210 Sandur*
*tlf. 361836*
Skrivstovan er opin mánadag til fríggjadag kl. 09-12 & 13-15.30 www.visitsandoy.fo

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
er opin týsdag og hósdag frá kl. 19.00-21.00.
Tlf. 318586.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Leygardag: kl. 22.30-23.30 AA-fundur.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundir - (Big book meeting)**
Týsdag: kl. 20.00 Stóri bókafundur er hvørt týskvøld í Losjuni á Tinghúsvegi 18. Inngongd frá Bøkjarabrekku.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og týskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundir í Vestmanna**
Í Skótahúsunum
Hósdag kl. 20 AA-fundur.
Sunnudag kl. 17 AA-fundur (opin fundur).

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
fundur fyri avvarðandi at alkaholikkara er hvørt týskvøld kl. 21, á Mýruvegi 22.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Brúdleyp**

Leygardagin 11. august kl. 13 giftast Malan Dahl Kastalag, Glyvrum, og Arni Zachariassen, Gøtu, bæði búsitandi í Aberdeen, Skotlandi, í Filadelfia í Gøtu. Eftir vígsluna verður móttøka, somuleiðis í Filadelfia, har øll eru vælkomin. Veitsla verður fyri innboðin á Hotel Hafnia kl. 19.

Leygardagin 11. august giftast Súsanna Sivertsen og Atli Danielsen, Klaksvík. Vígslan verður í Betesda kl. 15.00. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

11. august kl. 13.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Judith Reinert Hansen og Sámal Petur Petersen. Kaffimuður verður í kirkjukjallaranum eftir vígsluna. Borðhald verður á Svangaskarði kl. 17.30 fyri innbodnum.

11. august kl. 15.00 giftast í heiminum í Miðvági Jonrid Mikkelsen og Fróði Clementsen. Veitslan verður í SÍF-húsinum kl. 19.00.

Leygardagin 18. august kl 12 giftast í Leirvíkar kirkju Inga Mareta Klein úr Leirvík og Andreas Roel Joensen av Argjum. Tey ið vilja heilsa uppá brúðarparið eru vælkomin á Garðsgøtu 25 B á Argjum eftir kl 19.

Leygardagin 18. august kl 13.30 giftast í Sandavágs kirkju Elin Doris Dam, Miðvágur, og Jóhan á Mýrini, Sandavágur. Opið hús verður í heiminum hjá brúðurini frá kl. 19.30.

Leygardagin 25. august kl.15 giftast í Fuglafjarðar kirkju Bertha Sigurðbjørg Lambaa úr Fuglafirði og Kristian Sune Haraldsen ( Bassi ) úr Hoyvík. Veitslan verður fyri innboðin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.

Leygardagin 1. september kl. 15.00 giftast í Vágs kirkju Helen Hjelm og Hans Jákup Debess, Vágur. Veitslan verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 373319, 373711 og 373335 áðrenn mikudagin 15. august.

Leygardagin 8. september giftast Eivy Jónsveinsdóttur Olsen, Rituvík, og Jan Johannesen, Søldarfirði. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin at siga frá á tlf. 442268, 448622 ella 441127 áðrenn 20. august.

Leygardagin 29. sept. kl. 11.00 giftast í Elim í Søldarfirði Jytta Sundstein Olsen, Søldarfjørður og Poul Johannes Nielsen, Saltangará. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 15.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 567777 ella 258746 innan leygardagin 8. september.

Leygardagin 29 sep. kl. 17.00 giftast í Nólsoyar Kirkju Sonja Herietsdóttir, Vestmanna og Nicolaj Falck, Nólsoy. Vælkomst verður í Royndarhúsinum í Nólsoy frá kl. 19.00, tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma vera vinarliga biðin um at boða frá innan t. 29 august á tlf. 327050 ella 228010.